VIÐMERKINGAR

# Tilhaldið í Tórsgøtu

## Ein mentanarligur miðdepil fyri tey eldru í Havn

Ása Hátún

Fyri umleið 8 árum síðan yvirtók Tórshavnar Býráð gamla Føroya Banka. Katrin Dahl, tá býráðslimur, bar tá fram hugskotið at nýta henda prýðiliga bygning mitt í gamla býarpartinum til tilhaldsstað hjá teimum eldru í Havn og legði soleiðis lunnar undir slík eldratiltøk í Føroyum.

Her eru nakrar hugleiðingar um virksemið í Tilhaldinum, soleiðis sum eg havi upplivað tað.

Leiðslan er á høgum professionellum stigi, sum hevur ans fyri tí breidd, ið er neyðug fyri at skapa uppliving, menning og trivnað hjá eldri fólki. Við sær hevur leiðarin tvey fólk í hálvum starvi - við heilsufrøðiligum og listarligum førleika -, neyðuga reingerðarhjálp og eina seriøsa nevnd, demokratiskt vald á aðalfundi.

Umhvørvið á Tilhaldinum er sera vakurt og hugnaligt, og góði ansurin fyri tí estetiska letur upp fyri ríkari samveru við róð og hvíld í sinninum. Lat okkum tríva í nakað av regluliga virkseminum í húsinum.

### Matgerð

Eina ferð um vikuna ger ein "matbólkur" - kvinnur og menn - undir kønari leiðslu døgurða á staðnum, og fyri eitt lítið gjald kunnu tá onnur skriva seg upp til at eta við og soleiðis hittast til góða matsamveru við sunnum mati - genialt!

### Fimleikur

Tvær ferðir um vikuna er væl skipaður fimleikur. Undirtøkan er góð - fólk kemur eitt nú av Velbastað, ja, heilt úr Nólsoy, til at verða við til hesa stuttligu og stimbrandi løtu. Sum samsýning leggur tú bara eina 10-krónu til leiðaran.

### Felagssangur

Hvønn týsmorgun er fult hús, har øll í góðan tíma syngja saman av hjartans huga og fáa sær ein kaffimunn aftaná. Sjálvboðin fólk skipa fyri á flyglinum, sum Ingibjørg, einkjan eftir Andrias Restorff, hevur latið Tilhaldinum. Slíkar gávur hava ríkað stovnin, bæði til ognar og anda.

### Fyrilestrar, framløgur

Týsdag seinnapart kanst tú gleða teg til at fara á Tilhaldið at uppliva, lurta og síggja. Her hava verið nógvir ómetaliga áhugaverdir fyrilestrar. Nevnast kann í ár eisini temarøð, har fakfólk - eitt nú psykiatar, kostvegleiðarar og ergonomar - frá ymsum síðum hava lýst evnið "At taka ábyrgd av egnari heilsu". Altíð er stovan tá full av áhugaðum fólki. Her er av sonnum talan um upp-lýsandi og fyribyrgjandi virksemi, sum ivaleyst eisini í seinasta enda kann vera ein sparing hjá heilsuverkinum, fyri nú eisini at taka tey aktuellu peningaviðurskiftini við. Jú, tað er betri at fyribyrgja enn at lekja.

### Gongutúrar og útferðir

Mitt í viku verður farið út: gongutúrar, til onkra framsýning, vitjan á stovnum o.s.fr. Einar tvær ferðir um árið eru longri útferðir við endamáli og veitsludámi.

### Handverk

Hósdag og fríggjadag er ofta handverk á skránni, viðhvørt fyrifallandi arbeiði - onkur dugir okkurt, sum hini kunnu læra, og ofta skipa fólk seg sínámillum at hittast um hetta.

"Mother Therese"-teppini er eitt arbeiði fyri seg, sum altíð er í gongd. Hetta er felagstiltak fyri øll, sum binda fýrkantar av somu stødd, men í ymsum litum. Fýrkantar í hóskandi tali verða lagdir á borðið og telvaðir aftur og fram, til litsamansetingin riggar, og so verður seymað saman. Hesi snotuligu teppir verða send til hjálparfelagsskapin.

Ikki minst spennandi eru tey fyrireikaðu dagsskeiðini, har farið verður í dýpdina við onkrum evni. Altíð eru hesi skeið fullteknað. Tilhaldið eigur nógv amboð, oftast givin av fólki, sum vilja stovninum væl. Nevnast kann dreyibonkur við útgerð, karðimaskina, seymaskina, karðar, rokkar, snældur o.m.a. Eisini tilfar sum t.d. ull, tógv, litingartilfar hevur stovnurin, og alt hetta verður gagnnýtt til fulnar.

Her er talan um kvalitetssamveru. Fólk við felags áhuga koma á tal, prátið gongur, nýggj vinarbond verða knýtt, og glað og ríkað fara fólk aftur til hús. Jú, maður er mans gaman, og gleði er gott fyri heilsuna.

### Læra enskt

Tú kanst fara oman á Tilhaldið at "práta enskt". Kunnugur eldri lærari skipar fyri, og her sum í øðrum førum gjalda fólk eitt sindur fyri seg - einar 20 kr. hvørja ferð tað er lærararlønin.

### Telduhjálp

Eina ferð um vikuna situr fullkønur teldumaður og gevur vegleiðing í teldunýtslu, og annars er gott telduumhvørvi í húsinum.

### Annað virksemi

Í sambandi við jól er jólaútsøla. Tey eldru hava tilvirkað lutirnar, standa fyri søluni, og ágóðin fer til stovnin.

Á ólavsøku eru forvitnisligar framsýningar - oftast afturlítandi við myndum, lutum og upplýsandi tilfari um, hvussu lívið var fyrr. Hetta eru tiltøk, sum krevja stórt fyrireikingararbeiði.

Vitjan av øðrum stovnum. Ógloymandi var løtan, tá børn av einum barnagarði komu á Tilhaldið at dansa føroyskan dans. Børn og gomul, hond í hond, kvóðu og dansaðu saman. Slíkt eru ríkar løtur.

### Boccia í kjallaranum

Tey spæla og trena, melda seg til kappingar, og tvær ferðir hevur Tilhaldið vunnið slíka kapping.

Kortspøl og onnur spøl t.d. landastrok er óført at hittast til. Makkarar finna saman, og fólk koma hvørjum øðrum við. Tú kanst eisini seta teg fyri teg sjálvan á eina motiónssyklu ella í ein massagustól at slappa av. Í døpru myrkatíðini eru ljóslampurnar stimbrandi helst fyri tey eldru. Luksus? Nei, hetta er heilsumennandi, fyribyrgjandi og samfelagsliga gevandi.

### Um innlit

Nú hoyrast ætlanir um eitt eldraráð. Hvat plagar at koma burtur úr slíkum alment settum nevndum og ráðum? Mangan álit, sum enda í onkrari skuffu, og ikki eru tey ókeypis. Nei, hjálp til sjálvhjálp og stuðul til hugskot og fyritaksemi frá teimum, sum kenna tørvin, tað sæst munandi aftur.

Hvat innlit hava eitt nú tey á Almannastovuni og Heilsumálaráðnum um tað, sum veruliga fer fram á stovnum innan teirra umsitingarøki? Vildi mælt til, at onkur ábyrgdarfólk á økinum tók sær eina viku at fylgt tí virksemi, sum eitt nú á Tilhaldinum í Tórsgøtu og tilsvarandi stovnum úti um landið. Mangan tykist tað, sum at vinstra hond veit ikki, hvat høgra ger hjá myndugleikunum.

At enda kann eg nevna nøkur tøl, sum tala.

Seinasta árið hava ca. 14.000 vitjanir verið á Tilhaldinum í Tórsgøtu, og hetta talið er vaksandi.

Játtanin til Tilhaldið er umleið 800.000 kr. um árið. Her er veruliga talan um lítlan pening við sera stórari effekt.

At skerjingar mugu fara fram í tí almenna, nú fíggjarstøðan er, sum hon er, er væl skiljandi, og ibaleyst er tað til eina og hvørja tíð bara gagnligt, at gjølla verður hugt eftir, hvat almenningur peningur veruliga verður nýttur til; men við at spara virksemi burtur sum tað, ið fer fram í Tilhaldinum í Havn og alt meira eisini úti um landið, verður samfelagsliga munandi meira mist enn vunnið.

# Fyrsti sáttmálin

Jákup Sørensen
Gudmar Joensen
Svenning Eysturdal
Kári Sigurheim
Martin Dam
maskinmeistarar á Sundsverkinum

Síðani fyrsta sáttmálán millum SEV og Maskinmeistarafelagið, hava allir sáttmálarnir síðani verið avgreiddir millum SEV og MF, eftir vanligari mannagongd í sáttmálasamráðingum.

Hetta má sostatt metast sum hevdvunnin rættur.

Í hesum sambandi verur eisini víst til:

"Semja millum Føroya Landsstýri og Maskinmeistarafelagið", dagfest 16. feb. 1993.

stk 3. Landsstýrið ásannar, at yrkisfelagið hevur samráðingarrættin viðvíkjandi øllum fakligum viðurskiftum hjá limunum.

MF hevur ongantíð lagt aðrar sáttmálar ella sáttmálaúrslit til grund fyri sáttmálasamráðingum, men bert síni egnu ynski og krøv. Okkum vitandi hevur sáttmálin millum SEV og MF, heldur ongantíð verið grundarlag fyri ynskjum og krøvum frá øðrum feløgum.

Í sáttmálaskeiðunum hevur altíð valda friður. Tey tiltøk sum hesaferð eru sett í verk, hava ongantíð áður komið upp á tal, heldur ikki tá ið á stóð.

Við seinastu sáttmálasamráðingar, langaði táverandi landsstýrismaðurin trumfin á borðið longu í fyrsta umfarið. Soleiðis at sáttmálin millum SEV og MF skuldi leggja støði fyri komandi sáttmálasamráðingum hjá Fíggjarmálaráðnum.

Núverandi landstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur valt sama leistin, og lagt fótonglar fyri einari og skilagóðari semju.

Soleiðis skapa menn misálit á og máa støði undan einari skipan, ið hevur virkað í nógv ár.

Landið hevur einskilt og sett stórar ognur í almenn partabrøv, og fleri eru í umbúna. Hvar var eftirlitisskylda ánarans við teimum lønarsáttmálunum? Hvarv hon við einskiljingini?

Løgfrøðingur leggur seg nú sum tá út í kjakið, fyri at staðfesta heimildirnar hjá landsstýrismanninum at ógilda semingsuppskotið. Lítið bendir tó á, at hann hevur sett seg inn í semingsuppskotið.

Hevði hann gjørt tað, hevði hann helst havt staðfest heimildirnar hjá landsstýrismanninum at góðkenna semingsuppskotið - og báðir høvdu talst millum skilamenn.

Tá ið landið í nítiárunum lá í andaleypi og landskassin var tómur, fóru vit, stórt sæð uttan samráðingar og meiri at siga eftir harraboðum, munandi niður í løn. Hóast fíggjarstøðan hjá SEV var heilt ørðvísi enn tann hjá landskassanum.

Samráðingarnar seinastu árini hava staðfest, at vit eru munandi dragnaðir í løn og at hinir eru við at hvørva í blánanum. Tað er millum annað tað sum nevndin í MF, okkara vegna hevur sámráðst um.

# Keine Hexerei, : Nur Behändigkeit;

Hjalmar Norðberg Poulsen

Hesi nógv sigandi orðini hjá navnframa týska psykopatunum onkel Adolf renna mær í hug. Stytti mær stundir aftaná eina ótrationella og heldur margháttliga driftsvakt. Sum koblingsleiðari hjá Sev hevur ein siti í kontrollrúminum í Vestmanna við miklari ábyrgd og býtt tey tøku kilowattini út til allar føroyskar mannasálir, so kristiliga sum yvir høvur gjørligt,- hetta tí at talsjongulørurin í fíggjarmálastýrinum enn einaferð, á ivasaman juritiskan hátt, nossaði í tí.

Tað hevur verið ført fram, at tað ber ikki til, at 40 maskinmeistarar hjá Sev, av sínum eintingum kunnu lamma samfelag okkara. Jú tað kann kanska verða nakað um hetta. Veruleikin er tó tann, at henda ábyrgdafulla manning hevur rættiliga holla tekniska vitan á hesum øki, sum eitt framkomi samfelag ikki kann vera fyri uttan. Sjálvandi eiga teir sína virðing fyri hetta megnararbeiði, og sjálvandi eiga teir sína løn uppiborna. Hóast alt kemur hon ikki úr Føroyska Landskassanum. Kundi annars hugsað mær at vita, um landsins støða var eins kritisk, um nú 40 starvsfólk í politisku fyrisitingini, uttan aðra ávaring, fóru ein marglætistúr uttanlanda í eina viku. Fíggjarmálaráðharrin hevði tá kunnað roynt seg sum ferðaleiðari. Eitt er heilt vist,- hønurnar á Velbastað høvdu ikki lagt merki til hetta.

Framferðarháttur Fíggjarmálaráðharrans er undir alt lágmark! Hann niðurgerð og spottar felagsnevnd maskinmeistaranna. Hetta kemur rættiliga klárt fram, við tað at hann ikki ønir at boða felagsnevnd okkara frá negativu niðurstøðu hansara sáttmálanum viðvíkjandi, men heldur luftar tankan út í Føroyskum fjølmiðlum, aftaná at varðaløgmaður er eftursspurdur. Hetta feigt ótilgeviligt. Hoyrir ikki heima nú á døgum, men sum danin segði det var dengang, mænd var mænd og bøsser skydevåben. Men nú nýggjar tíðir eru, broytist alt, bæði menturnarliga, kynsliga og ikki minst poliktisk. Føroyska demokratiið er við at gleppa okkum av hondum og Stalinisman blómar.

Nú Løgtingi er kalla saman í úrtíð, er tað mín vón, at diktatorisku lokalbrøgdini ikki eydnast,- soleiðis at demokratisk viðurskifti vinna frama og sáttmálin kann staðfestast, samfelag okkara til mikið gagns.